# Brunaumsjónin gevur Oyvindi gegnistrupulleikar

**– Tað er óheppið, at eg sum landsverkfrøðingur og byggiharri eisini havi evstu ábyrgdina av Brunaumsjón Landsins, ið er eftirlitismyndugleikin. Tað sigur Oyvindur Brimnes, sum tekur undir við, at ábyrgdin av Brunaumsjónini verður flutt aðrastaðni. Politiska avgerðin um at flyta ábyrgdina er longu tikin, og arbeiðsbólkur kannar í løtuni, hvar ábyrgdin av stovninum eigur at liggja í framtíðini**



*– Eg haldi tað vera óheppið, at eg sum landsverkfrøðingur eisini havi ábyrgdina av Brunaumsjónini. Tað gevur gegnistrupulleikar, ikki bara í samband við arbeiðið við Vágatunnlinum, men í samband við øll arbeiði hjá landsverkfrøðinginum, sum krevja góðkenning frá Brunaumsjónini, sigur Oyvindur Brimnes. Hann fegnast tí um, at Brunaumsjónin eftir øllum at døma verður flutt frá Landsverkfrøðinginum innan stutta tíð*

GEGNI
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, tekur fult undir við ætlanunum at flyta ábyrgdina av Brunaumsjón Landsins frá Landsverkfrøðinginum. Hann vísir á, at tað kann vera óheppið, at hann sum landsverkfrøðingur, tvs. byggiharri, eisini hevur evstu ábyrgd av Brunaumsjónini, tvs. myndugleikanum, ið skal hava góðkenna og hava eftirlit við trygdini av projektunum hjá Landsverkfrøðinginum.

– Tað kann vera óheppið, at eg sum byggiharri eisini havi ábyrgdina av myndugleikanum, ið góðkennir trygdina – har kann eg fáa ein gegnistrupulleika, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

### Vágatunnilin einki eindømi

Umframt at vera landsverkfrøðingur og harvið eisini ovasti myndugleiki hjá Brunaumsjónini, er Oyvindur Brimnes nevndarlimur í P/F Vágatunnilin. Hóast hann eisini er nevndarlimur í partafelagnum, sum stendur fyri undirsjóvartunnlinum, so metir Oyvindur Brimnes ikki, at tað í sær sjálvum kann geva honum gegnistrupulleikar. Hann metir ikki mun vera á, hvørt Landsverkfrøðingurin situr í nevndini í einum partafelag, sum skal byggja ein tunnil, heldur enn at Landsverkførðingurin sjálvur stendur fyri arbeiðinum at gera ein tunnil.

Í løgtingslógini fyri Vágatunnilin stendur, at Landsverkfrøðingurin skal góðkenna tunnilsverkætlanina, áðrenn arbeiðið verður sett í verk, og eisini skal stovnurin hava eftirlit við, at arbeiðið verður gjørt í samsvar við góðkendu ætlanina. Tí heldur Oyvindur Brimnes tað vera ein sjálvsagdur lutur, at landsverkfrøðingurin er umboðaður í nevndini í partafelagnum, sum stendur fyri arbeiðinum at gera Vágatunnilin.

Oyvindur Brimnes vísir á, at gegnistrupulleikin liggur í, at hann eisini er ovasti fyri Brunaumsjónina. Hann sigur seg skilja, um fólk seta spurnartekin við leiklutin hjá sær, tá hann í næstum sum ovasti fyri Brunaumsjónina skal góðkenna trygdina í undirsjóvartunnlinum.

– Eg eri greiður yvir, at mín støða skjótt kann elva til illgitingar millum manna, og at spurnartekin kunnu vera sett við gegnið hjá mær. Men eg meti ikki, at gegnistrupulleikin hjá mær er størri í samband við góðkenningina av Vágatunnlinum enn tá eg til dømis skal góðkenna ein annan tunnil, ið Landsverkfrøðingurin sjálvur hevur staðið fyri, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann ásannar, at hann sum nevndarlimur í P/F Vágatunnilin kann koma undir trýst frá restina av nevndini um at gera sína ávirkan galdandi í Brunaumsjónini, so tunnilin ikki verður seinkaður av hesi orsøk.

– Sum eitt hugsað dømi kundi tað verið tilfeldið, at eg í nevndini í P/F Vágatunnilin bleiv trýstur til at góðkenna tunnilin áðrenn 10. desember, av tí at eg nú eisini eri ovasti fyri Brunaumsjónini. Men har má eg vísa á trygdarkrøvini, ið eru sett til tunnilin. Kunnu ávís krøv ikki lúkast áðrenn tunnilin skal lata upp, so skal P/F Vágatunnilin vísa á aðrar trygdarætlanir, sum viga upp ímóti upprunaligu krøvunum, so samlaða trygdin ikki gerst verri. Annars verður tunnilin ikki góðkendur, sigur Oyvindur Brimnes. Hann leggur afturat, at hann í tí dagliga í minst møguligan mun leggur seg út í arbeiðið hjá Brunaumsjónini, men av tí at hann hevur evstu ábyrgdina, noyðist hann at fylgja við arbeiðinum, og hann sær eisini úrskurðirnar, sum leiðarin fyri Brunaumsjónina kemur til.

– So leingi eg sum landsverkfrøðingur havi ábyrgdina av Brunaumsjónini, má eg royna at arbeiða eftir míni bestu sannføring, og annars leggja meg so lítið sum gjørligt út í arbeiðið hjá Brunaumsjónini, sigur Oyvindur Brimnes.

### Ábyrgdin flytast

Tað tykist greitt, at sjónarmiðini hjá Oyvindi Brimnes skjótt fara at síggjast aftur. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ið varir av Landsverkfrøðinginum, hevur tikið avgerð um at Brunaumsjón Landsins skal loysast frá Landsverkfrøðinginum, so ella so.

Í løtuni situr ein bólkur og arbeiðir við spurningunum um, hvat skal vera av Brunaumsjónini í framtíðini. Sjey-manna bólkurin er mannaður við fólki frá Løgmansskrivstovuni, Vinnumálaráðnum, umframt at leiðararnir og starvsfólkaumboð fyri Brunaumsjónina og Arbeiðseftirlitið eru við.

Hjørdis Gaard, fulltrúi, ið umboðar Vinnumálaráðið í bólkinum, sigur, at arbeitt verður við tveimum ymsum loysnum. Antin at skipa Brunaumsjónina í ein sjálvstøðugan stovn, ella at leggja Brunaumsjónina saman við øðrum stovni. Bólkurin skal sum so ikki koma við nøkrum tilmæli til landsstýrismannin, men heldur lýsa fyrimunir og vansar við báðum loysnum. Hjørdis Gaard sigur, at umframt møguleikan at skipa Brunaumsjónina sum sjálvstøðugan stovn, leysan av Landsverkfrøðinginum, so verður eisini arbeitt við møguleikanum at leggja saman Brunaumsjónina og Arbeiðseftirlitið. Hon leggur afturat, at ein møgulig samantvinnan av Brunaumsjónini og Arbeiðseftirlitinum bara kann gerast ein góð loysn, um undirtøka er fyri tí á stovnunum báðum, og m.a. tí eru báðir stovnar umboðaðir í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur sum so onga tíðarfreist fingið fyri, nær tey skulu lata landsstýrismanninum sína frágreiðing, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við báðum møguleikum. Men Hjørdis Gaard sigur, at arbeitt verður við málinum, og tí væntar hon ikki, at meira enn nakrir fáir mánaðir fara at ganga, til arbeiðsbólkurin er liðugur við sítt arbeiði. Í síðsta enda verður tað uppgávan hjá landsstýrismanninum at taka støðu til, hvørja loysn hann velur fyri Brunaumsjónina.

### Ein góð loysn

Oyvindur Brimnes heldur tað vera eina góða loysn, at myndugleikin yvir Brunaumsjónini verður loystur frá landsverkfrøðinginum.

– At Brunaumsjónin liggur undir landsverkfrøðinginum er ein trupulleiki, ikki bara í samband við Vágatunnilin, men í samband við øll arbeiði hjá landsverkfrøðinginum, ið krevja eina trygdargóðkenning ella góðkenda tilbúgvingarætlan, sigur Oyvindur Brimnes.



# Vøkstur í ferðafólkatali

*Líkt er til, at ferðahugurin flogvegis stendur við og veksur*



**– Síggja vit burtur flúgvingini í sambandi við oljuboringarnar, so er talan um ein stóran vøkstur í ferðafólkatalinum, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri**

HAGTØL
*Heri á Rógvi*

Hugurin at ferðast flogvegis bilar einki í Føroyum í hesum døgum. Hetta vísa nýggjastu hagtølini frá Vága Floghavn.

Frá 1. januar í ár til 31. oktober ferðaðust 138.230 fólk um flogvøllin. Hetta eru 1,1% færri fólk enn fyri somu tíggju mánaðir í 2001.

Hesin negativi vøksturin skal eisini síggjast í ljósinum av, at 2001 var í alstóran mun merkt av royndarboringunum á føroyskum øki. Hetta økti munandi um talið av ferðandi. Serliga tí, at hvør ferðandi ferðaðist fleiri ferðir, og munaði tískil rættiliga væl í samlaðu hagtølunum.

– Síggja vit burtur flúgvingini í sambandi við oljuboringarnar, so er talan um ein stóran vøkstur í ferðafólkatalinum, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri.

Hetta sæst einabest í september og oktober í ár. Tá vóru boringar við at vera lidnar í fjør.
Í september var vøksturin í ferðafólkatalinum 9,1% og í oktober var vøksturin 7,1% í mun til í fjør.

Summarmánaðirnir vóru heldur slakari í ár enn í fjør, men gongdin tykist nú at vera vend. Heldur verandi gongd fram, so kann hugsast, at samlaða talið gerst størri enn í fjør.

Flogvallarstjórin sigur um gongdina higartil í ár, at hon er, sum hann hevði roknað við.

Hann vísir á, at teir bæði í ár og í fjør hava sæð, at kampagnuprísirnir hjá flogfeløgunum gera mun.

– Vit sóu eitt nú í fjør, at nógv fleiri fólk fóru til Danmarkar at halda jól hjá næstringum orsakað av bíligu ferðaseðlaprísunum, sigur Finnbogi Niclasen.

Talið av fráferðum og komum fyrstu tíggju mánaðirnar í ár var 4.476. Aftur her merkist vantandi oljuflúgvingin í ár. Talið av fráferðum og komum er nevniliga minkað við 11,1% ella við 557 fráferðum og komum í mun til sama tíðarskeið í fjør.

### Postur og farmur

Minni ferðandi gevur aloftast pláss til meira post og farm. Oktober setti eisini met í so máta. 59,9 tons av posti vórðu flogin í oktober, og hetta er tað mesta fyri nakran mánað í ár. Samanlagt eru 511 tons av posti flutt um flogvøllin í Vágum. Hetta er ein vøkstur áljóðandi 7,5% í áðurnevnda tíðarskeiðií mun til í fjør.

Hóast talið av farmi gjørdist tað næst mesta fyri nakran mánað í ár í oktober, so fer framvegis ein stór minking fram á hesum økinum í mun til í fjør.

Samanlagt 294,8 tons av farmi eru flutt um flogvøllin í ár, og minkingin í mun til í fjør er higartil 7,9%.

# Elektron má hálsa um

**– Nýggja GjaldSkipanin hjá Elektron er ikki í tráð við lógina, staðfestir Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum. Í løtuni verður arbeitt við einari nýggjari kunngerð um persónsupplýsingar, men hendan loyvir heldur ikki nýggju GjaldSkipanini. KT-felagið kallar ætlanirnar eina hóttan móti rættartrygdini**



*Høgni Hoydal ætlar ikki at lata seg ávirka av tí nógva rokinum um lógina persónsupplýsingar. Lógin stendur við, og ein nýggj skal gera lógina enn meira greiða*

GJALDSKIPAN
*Heri á Rógvi*

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, ger púra greitt, at nýggju GjaldSkipanin hjá Elektron ikki er í tráð við galdandi lóggávu.

Nýggi gjaldskipanin er gjørd í samstarvi við danska stovnin PBS, og ein fittur partur av føroyska vinnulívinum er longu farin at nýta hesa skipanina. Skipanin hevur eisini verið dýr hjá Elektron at framleiða.

Bæði nevndarformaðurin í Elektron, Jørn Astrup Hansen, og stjórin fyri Elektron, Niels Christian Nolsøe, góvu í síðstu viku sína stóru misnøgd til kennar. Teir kendu tað sum um, at teir høvdu fingið øll neyðug loyvi frá Dátueftirlitinum. Báðir tveir undraðust stórliga á, at málið nú væntandi fer eina aðra vend.

Kristian Magnussen hevur sent Høgna Hoydal ein skrivligan fyrispurning um sama evni.

Kjarnin í málinum er løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum. Hendan lóg kom í gildi á nýggjárinum.

Grein eitt er soljóðandi: »Lógin hevur til endamáls at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar, soleiðis at persónsupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku.«

### Púra greitt

– Løgtingið hevur samtykt eina lóg, sum er púra greið. Tað er hana, vit fylgja. Eg dugi ikki at síggja, hví tað verður so nógv tosað um hana nú. Vit skulu fylgja hesari eins og øðrum av landsins lógum, sigur Høgni Hoydal.

Landsstyrismaðurin heldur tað vera ein spurning um grundleggjandi trygd fyri hin einstaka.

– Tá tosað verður peningastovnarnar – her hugsi eg ikki bara um Elektron – er tað týdningarmesta, at tað er ein grundleggjandi trygd hjá føroyingum, at upplýsingar um teirra kontoir, persónsupplýsingar og aðrir upplýsingar verða varðveittir í Føroyum. Tað merkir ikki, at tú ikki gjalda rokningar í útlandinum. Tað er hetta, málið snýr seg um, sigur Høgni Hoydal.

Nógva skrivingin og orðaljóðið um evni í seinastuni metir Høgni Hoydal mest av øllum sum trýst frá áhugabólkum, og hann sigur seg ikki ætla út í kjak við teir um evni.

Høgni Hoydal og hansara fólk í løgmálaráðnum arbeiða í løtuni við einari nýggjari kunngerð, sum skal setast í gildi í sambandi við lógina um persónsupplýsingar. Hetta kunngerð skal gera tað meira greitt, hvat lógin inniber. Kunngerðin fer so avgjørt heldur ikki at loyva Elektron at nýta nýggju gjaldskipanina.

Høgni Hoydal ætlar sær at á fund við m.a. Elektron um kunngerðin, soleiðis at tey sleppa at síggja kunngerðina, áðrenn hon verður sett í gildi.

### Rættartrygd

KT-felagið, sum m.a. hevur Elektron sum lim, og formaðurin í felagnum starvast eisini hjá Elektron, hevur sent Høgna Hoydal og Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, eitt skriv, har víst verður á teirra ónøgd við umsitingini av lógini um persónsupplýsingar.

KT-felagið nevnir m.a. í skrivinum, at málið er farið av kós, og teir siga seg rokna við, at verandi politikkur á økinum kann gerast álvarsliga tyngjandi fyri KT-vinnuna.

Eisini nýta teir rættiliga hvassorðað orðaljóð í støðum í skrivinum.

– Eftir okkara tykki er tað er ein hóttan ímóti rættartrygdini, tá løgtingið setir lógir í verk, sum skerja virksemið hjá ávísum fyritøkum ella skipanum. Í hesum føri kann tað, hóast tað neyvan var ætlanin, skerja møguleikarnar hjá føroysku KT-vinnuni í framtíðini, skrivar altso KT-felagið.

Hesum er Høgni Hoydal tó ikki samdir við.

– Tað er júst øvugt. Vit hava gjørt okkara EDV-lóggávu tíðarhóskandi, og tað var eisini eitt samt løgting, ið tók undir við lógini. Hetta varð eisini gjørt í tráð við tað, at vit liva í einum samanbundnum heimi. Løgtingið hevur talað greitt, og øll mugu halda løgtingslógirnar, sigur Høgni Hoydal.

Eisini tað almenna má halda lógina. Høgni Hoydal veit at siga, at tað almenna eisini má gera nakrar broytingar.

Sum heild hevur landsstýrismaðurin ilt við at skilja, hví tað nú er komið eitt alment kjak um evni.




*Landsstýrismaðurin í lógarmálum góðtekur ikki nýggju GjaldSkipanina hjá Elektron. Tað er tó óvist, hvørjar fylgjur hetta fær fyri Elektron.*